# Hevur boðið fakfeløgunum við til at gera arbeiðið liðugt

ARBEIÐS-MARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*

Tað kann ikki sigast annað, enn at tað hjálpti, tá ið fakfeløgini sutt fyri jól vístu sína misnøgd við uppskotið, sum vinnumálastýrið hevði gjørt um seming í sambandi við sáttmálasamráðingar á arbeiðsmarknaðinum.

Tað loypti rættiligt øði í fakfeløgini, tá ið vinnumálastýrið sendi fakfeløgum og ørðum, uppskotið til ummælis seint í heyst.

Feløgini átalaðu m.a. harðliga, at uppskotið fór at taka fakfelagsrættindi frá fakfeløgunum og fór skerja samráðingarrættin. Eitt nú vildu tey ikki góðtaka, at semingsstovnurin eftir nýggja uppskotinum fór at fáa at kalla óavmarkaðar heimildir at útseta eitt verkfall.

Eftir hetta boðaði Bjarni Djurholm frá, at hann var sinnaður at laga uppskotið til.

Annars helt hann, at sumt av tí,sum fakfeløgini førdu fram, var misskilt og yvirtulkað og hann helt, at fakfeløgini høvdu skotið honum motiv í skógvarnar, sum hann ikki hevði havt.



*– Taka fakfeløgini av, ivist eg ikki í, at vit koma til eitt skilagott úrslit, sigur Bjarni Djurholm*

## Uppí part aftur

Síðani er tað hent, at Vinnumálastýrið kallaði fakføløgini til fundar beint fyri jól at tosa um um uppskotið.

– Har greiddu vit feløgunum frá uppskotunum og frá teimum yvamálum, sum vóru, sigur Bjarni Djurholm.

Hann sigur, at eftir fundin heldur hann framvegis, at fakfeløgini hava misskilt og yvirtulkað partar í uppskotinum og at tey leggja honum motiv í skógvarnar, sum hann ikki hevur.

Men hann sigur framvegis, at tað skal ikki skorta uppá vilja at orða uppskotið øðrvísi fyri at sleppa undan hesum misskiljingum og yvirtulkingum.

Tí hevur hann nú boðið fakfeløgunum at gjøgnumganga uppskotið saman við vinnumálastýrinum og at laga tað til.

– Eg vóni, at fakfeløgini taka av og vilja koma uppí aftur arbeiðið at gera uppskotið liðugt.

Tá ið hann sigur at hann vónar, at feløgini koma uppí aftur, sipar hann til, at fakfeløgini vóru uppruna-liga við í einum arbeiðsbólki, sum varð settur at gera uppskotið.

Men arbeiðsbólkurin syndraðist, tí ósemja tók seg upp ímillum fíggjarmálastýrið og fakfelagsumboðini um samsýningina til nevndarlimirnar.

Tí endaði tað við, at Vinnumálastýrið gjørdi lógaruppskotið liðugt einsamalt.

Bjarni Djurholm sigur, at hetta er eitt uppskot fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum, tí var tað eisini alla tíðina ætlanin, at fakfeløgini skuldu vera við til at gera tað. Men feløgini tóku seg burturúr arbeiðnum, tá ið ósemja tók seg upp um samsýningina.

– Mín uppgáva er at dagføra eina elligamla lóg sum varð gjørd mitt í tjúgunum. Tí vóni eg, at fakfeløgini og vit kunnu halda fram at viðgerða málið í felag.

– Vilja tey tað, ivist eg ikki í, at vit koma til eitt skilagott úrslit, sigur hann. Hann sigur, at fyri ikki at standa á berum, um hetta skuldi miseydnast, hevur hann gjørt av, at til samráðingarnar, sum verða á arbeiðsmarknaðinum í vár, skulu semingsmenn veljast eftir gomlu lógini.

# Taka ikki arbeiðið uppaftur fyrrenn tey hava fingið greiðar linjur

**–Fakfeløgini fara ikki at taka arbeiðið uppaftur, fyrrenn semja er fingin um** samsýningina hjá nevndarlimunum, sigur formaðurin í sjeymannabólkinum hjá fakfeøgunum

ARBEIÐS-MARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*

Enn tað óvist um fakfeløgini fara at taka av tilboðnum frá Vinnumálastýrinum um at at taka arbeiðið uppaftur at gera uppskotið um seming á arbeiðsmarknaðinum, liðugt.

Sum tað sæst í grein aðrastaðni í blaðnum, hevur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, bjóða fakfeløgunum uppí aftur arbeiðið at gera uppskotið um seming liðugt.

Upprunaliga varð ein arbeiðsbólkur, har fakfeløgini vóru umboðað, settur at gera uppskot um seming, men tað arbeiðiåð helt uppat, tí at ósemja tók seg upp ímillum fakfeløgini og Fíggjarmálastýrið um samsýningina til nevndarlimirnar.

Men nú ætlar Bjarni Djurholm, sum sagt, at fáa fakfeløgini uppí aftur arbeiðið.

– Vinnumálastýrið kom í tað løgnu støðu, at arbeiðið at gera uppskot um seming, steðgaði, tí at ósemja tók seg upp ímillum fakfeløgini og eitt heilt annað aðalstýri - Fíggjarmálastýrið- um nevndarsamsýningina.

Hvussu verður við nevndarsamsýningini, nú ætlanin er at taka arbeiðið uppaftur, er ikki greitt.

Bjarni Djurholm sigur, at Vinnumálastýrið hevur onki ímóti, at nevndarlimir, sum ikki hava arbeiði, ella sum hava lønarmiss av at vera við í arbeiðsbólkinum, fáa samsýning fyri nevndararbeiðið.

Men hann heldur ikki, at tað er rímiligt, at nevndarlimir, sum fáa løn frammanundan, eitt nú fakfelagsformenn, eisini skulu hava nevndarsamsýning fyri at vera við í arbeiðnum.

– Tað halda vit er at fáa tvær lønir fyri at gera eitt og sama arbeiði.

## Greiðar linjur

Joan Ziskason, formaður í Sjeymannabólkinum hjá fakfeløgunum, vísir aftur, at fakfeløgini tóku seg úr arbeiðsbólkinum.

– Arbeiðið helt uppat, tí at ósemja tók seg upp um samsýningina.

Hon sigur, at síðani hevur brævaskifti verður ímillum fakfeløgini og Fíggjarmálastýrið um, hvussu nevndarlimir skulu samsýnast.

– Men enn er onki avgjørt og ongin semja er funnin.

Hon sigur, at fakfeløgini hava boðað frá, at arbeiðið verður ikki tikið uppaftur, fyrrenn semja er fingin um samsýningina.

– Og tað standa vit við, sigur hon

Sostatt er tað enn ógreitt, um, ella nær, fakfeløgini fara at taka av tilboðnum frá Vinnumálastýrinum um at taka arbeiðið um uppskotið um seming uppaftur. Hon sigur, at fakfeløgini krevja ikki, at t.d. løntir fakfelagsformenn, skulu fáa nevndarsamsýning eisini.

– Men tey, sum hava lønarmiss av at taka lut í nevndararbeiði, og tey, sum hava ferðaútreiðslur ella aðrar útreiðslur, eiga at fáa samsýning, sigur Joan Ziskason



*– Vit hava roynt at fáa semju, men enn er onki hent, sigur Joan Ziskason, formaður í Sjeymannabólkinum hjá fakfeløgunum*



# Nýtt met í flogferðsluni

**Fleiri ferðafólk enn nakrantíð fóru í fjør um flogvøllin í Vágum, og vøkstur var eisini í farma- og postflutninginum loftvegis**

FLOGFERÐSLA
*Eyðun Klakstein*

2000 var enn eitt metár fyri flogvøllin í Vágum.

Ferðslan umvegis fløgvøllin økist støðugt, og aftur í fjør toppaði ferðafólkaflutningurin.

143.208 fólk ferðaðust samanlagt um flogvøllin í Vágum í fjør, og hetta var meira enn 14.000 fleiri ferðafólk enn árið fyri. Vøksturin er 11 prosent.

Flogvøllurin í Vágum hevur hagtøl fyri ferðafólkaflutningin aftur til 1963, tá 946 fólk ferðaðust um flogvøllin. Í 1979 kom talið á ferðafólkum fyrstu ferð upp um 50.000, og í 1988 rundaði talið fyrstu ferð 100.000 fólk.

Næstu árini ferðaðust færri fólk um flogvøllin, og talið kom niður á 87.000 í 1993, áðrenn gongdin aftur vendist, og nú nærkast talið tí tvífalda eftir bara sjey árum.



*Flogferðslan um flogvøllin í Vágum vaks munandi í fjør. Serliga ferðafólkatalið var fyri stórum vøkstri, og tað komst millum annað av nógvum tilboðum á ferðaseðlum*

## Tey flestu til Danmarkar

Helst hava bíligu ferðaseðlarnir hjá Atlantsflog og Maersk havt sína ávirkan á ferðafólkatalið, tí summar mánaðir er vøksturin sera stórur.

Í apríl og mai mánaði í fjør ferðaðust um 20 prosent fleiri ferðafólk um flogvøllin sammett við 1999. Vøksturin er eisini munandi í summarmánaðum, men í november eru aftur 20% fleiri ferðafólk staðfest í hagtølunum.

Tey, sum fara á flog úr Vágum, fara fyrst og fremst til Danmarkar. Heili 60.425 av teimum 71.996 fólkunum, sum fóru úr Vágum, fóru til Danmarkar.

Síðani fóru 5.035 til Íslands, 3.523 til Skotlands og 1.190 til Noregs.

Eisini tá talan er um ferðafólk, sum koma við flogfari í Vágarnar, koma nógv tey flestu úr Danmark.

## Nógv fleiri fráferðir

Tað er ikki bara ferðafólkatalið, sum økist á flogvøllinum í Vágum. Vøkstur er eisini á øllum øðrum økjum.

Fráferðirnar úr Vágum fóru úr 4281 í 1999 og upp í 4821, og tað vil siga, at tað vóru meira enn 500 fleir fráferðir úr Vágum í 2000, enn tað vóru árið fyri.

Í 1980 vóru 1760 fráferðir úr Vágum, so hetta talið er næstan tríggjar ferðir so høgt 20 ár seinni.

Ein lítil vøkstur var eisini í farmaflutninginum. Í 2000 vóru 406,6 tons av farmi flutt umvegis flogvøllin, og tað er eitt hálvt prosent meira enn árið fyri.

## Minni jólaflutningur

Bæði í byrjanini og í endanum av árinum var farmaflutningurin minni enn í 1999, meðan til dømis august mánaði royndist serstakliga væl við einum vøkstri upp á 28 prosent.

Jólaflutningurin av farmi var sjey prosent lægri í 2000, enn hann var í 1999, og eisini november og oktober mánaðarnir vóru munandi slakari í fjør.

Postflutningurin um flogvøllin vaks við tveimum prosentum í 2000. Samanlagt vórðu 591,4 tons av posti flutt um flogvøllin.

# Prísátøkini gera mun

**Tað sæst aftur í ferðafólkatalinum í Vágum, at flogfeløgini høvdu stór prísátøk í fjør. Bæði á vári og á heysti vaks ferðafólkaflutningurin um flogvøllin munandi**

FLOGFERÐSLA
*Eyðun Klakstein*

14.000 fleiri ferðafólk fóru í fjør um flogvøllin í Vágum sammett við 1999. Stóri vøksturin kemst ivaleyst av ymsum orsøkum, men kampanjurnar hjá flogfeløgunum hava havt ávirkan.

– Flogfeløgini høvdu prísátøk í fjør, og tey hava fingið fleiri fólk at ferðast, sigur Torfinn Jacobsen, sum umsitir hagtølini hjá Vága Floghavn.

– Í apríl og mai var ein munandi vøkstur í ferðafólkatalinum, tá átøkini vóru, og aftur fram móti jólum, tá serlig tilboð vóru á ferðaseðlum úr Føroyum til Danmark, var stórur vøkstur, sigur hann.



## Roknar við vøkstri í ár

Torfinn Jacobsen vísir samstundis á, at økingin av ferðafólkum hevur verið støðugur alt árið, og allir mánaðirnir uttan september vóru betri enn í 1999.

Hann heldur, at vøksturin í ferðafólkatalinum eisini skyldast, at tað er vorðið meira vanligt hjá fólki at flúgva, og hann roknar tí eisini við, at ferðafólkatalið í Vágum fer at økjast í ár.

– Í 2000 var vøkstur heili 11 prosent. So stóran vøkstur kunnu vit ikki rokna við, men eg vildi mett, at tað verður ein ávísur vøkstur í ár – kanska serliga um oljuvinnan kemur rættiliga í gongd, sigur hann.

## Farmur upp og niður

Lítil vøkstur var í farma- og postflutninginum í fjør, og summar mánaðir hongur tað saman við, at tey mongu ferðafólkini gera, at minni pláss er fyri farma- og postflutningi.

– Hetta er ivaleyst orsøkin til, at farmaflutningurin í desember var minni í 2000 enn í 1999. Flogførini kunnu ikki flyta eins nógvan farm, tá ferðafólkatalið veksur nógv, sigur Torfinn Jacobsen.

Stór skifti eru í farmaflutninginum gjøgnum árið. Í mars mánaði í 2000 vaks farmurin við 50 prosentum, og í august var vøksturin 28 prosent. Stór minking var hinvegin í oktober og november mánaði.

– Eg dugi ikki rættiliga at siga, hví tølini eru so ymisk fyri teir ymsu mánaðirnar, men eg kann í hvussu so er staðfesta, at slík gongd er ikki óvanlig, sigur Torfinn Jacobsen.

# Heini bygdaráðsformaður

**Heini O. Heinesen hevur nú tikið við aftur sum bygdaráðsformaður í Kunoyar kommunu**

KUNOY
*Eyðun Klakstein*

Nýggja bygdaráðið í Kunoyar kommunu hevur skipað seg.

Løgtingsmaðurin Heini O. Heinesen verður nú aftur bygdaráðsformaður í Kunoyar kommunu, og John Damberg verður næstformaður.

Kunoyar kommuna umfatar Kunoyar bygd og Haraldsund, og bygdirnar høvdu hvør sín lista til kommunuvalið.

Listi A, sum var mannaður við monnum úr Kunoy, fekk trý umboð, og listi B fekk tvey umboð á kommunuvalinum í november.

## Heini flestar atkvøður

Heini O. Heinesen fekk flestar atkvøður á valinum. Hann fekk 21 atkvøður. Harafturat vórðu eisini Atli Vilhelm og Jaspur Kruse valdir í bygdaráðið av lista A, sum samanlagt fekk 48 atkvøður.



*Løgtingsmaðurin fyri Tjóðveldisflokkin, Heini O. Heinesen, verður bygdaráðsformaður í Kunoy næstu fýra árini*

Listi B fekk 41 atkvøður, og av teimum fekk John Damberg flestar – 12 atkvøður. Afturat honum kom eisini Hanna í Kongsstovu í nýggja bygdaráðið, og hon er einasta kvinnan, sum skal sita næstu fýra árini.

104 fólk at atkvøðurætt til valið í Kunoy, og av teimum settu 89 fólk kross á atkvøðuseðilin.